**Fundarskrá hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 11. desember 2018, kl. $17^{00}$**

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Eyðun Hansen, Ingi Olsen, Laila Haldansen, John Zachariassen, Herit Magnussen og Durita á Heygum
**Skrivari:** Maud Poulsen

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 113**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um uppskot frá teknisku deild um broytingar í byggisamtyktini.
J.nr. 102002-4-2018

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 3. desember 2018 uppskot frá teknisku deild, dagf. 3. desember 2018, um broytingar í byggisamtyktini.
(Mál nr. 113 frá fundinum 12. november 2018: mál frá teknisku deild um broytingar í byggisamtyktini.
Nevndin samtykti at heita á teknisku deild um at gera uppskot um broytingar til komandi fund.)

Tekniska Nevnd samtykti hesar broytingar í mun til uppskotið frá teknisku deild:

- matr. nr. 94a og 74a verða broytt frá miðstaðarøki til neystalendi
- matr. nr. 241a og 23b verða verandi miðstaðarøki
- at varðveita neystalendini á matr. nr. 253a og 253b, men at broyta lendið undir sethúsunum á somu matriklum til sethúsaøki.

Við nevndu broytingum í mun til uppskotið mælir nevndin til at samtykkja broytingarnar.

Nevndin mælir eisini til at seta í ásetingarnar fyri neystalendi, at niðasta hædd á bygningi á neystalendi, skal verða brúkt sum neyst.

**Viðv. 113**
Durita á Heygum, forkvinna í Teknisku nevnd, mælti til at samtykkja tilmælið við tí ískoyti um, at økið undir neystinum á matr. nr. 256 hjá Jan Súna Christiansen framhaldandi verður neystalendi, ímeðan restin av matriklinum verður broytt til sethúsaøki.

Tilmælið við ískoytinum var samtykt við 6 atkvøðum fyri og 1 ímóti.
Pauli T. Petersen, Durita á Heygum, Laila Haldansen, Ingi Olsen, John Zachariassen og Herit Magnussen atkvøddu fyri. Eyðun Hansen atkvøddi ímóti.

**Mál 114**
Tilmæli frá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini um nýtt heiti til bingjuplássið.
J.nr. 8504002-2-2018

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin hevur viðgjørt málið um faldara til bingjuplássið. Í hesum sambandi hevur nevndin umrøtt nýtt heiti til plássið, tí nevndin er samd um, at heitið bingjupláss ikki er hóskandi.

Nevndin mælir bygdarráðnum til at taka undir við, at heitið verður broytt til "Ruskplássið".

**Viðv. 114**
Pauli T. Petersen, borgarstjóri, skjeyt upp at samtykkja at skriva út navnakapping um heitið á bingjuplássinum.
Atkvøtt var fyrst um broytingaruppskotið, sum var einmælt samtykt. Atkvøtt var ikki um upprunaliga tilmælið.

**Mál 115**
Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um áseting av almennu fundardøgunum fyri 2019
J.nr. 22022-1-2016

Undirritaði mælir til at almennu fundardagarnir hjá Vestmanna Bygdarráði í 2019 vera hesir:

29. januar
26. februar
26. mars
30. apríl
28. mai
18. juni
27. august
24. september
29. oktober
26. november
10. desember

Fundirnir byrja vanliga kl. 19$^{00}$.

**Viðv. 115**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 116**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018.
J.nr. 30102-2-2017

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 5. desember 2018 uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð og mælir til, at uppskotið verður samtykt.

**Viðv. 116**
Tilmælið var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.15

Sign.:

Pauli T. Petersen Ingi Olsen Eyðun Hansen

John Zachariassen Laila Haldansen Herit Magnussen Durita á Heygum